# From sleppur nú at spæla

**Nýggi danin í Runavík, Karsten From, er nú klárur at tørna til fyri NSÍ. Mánakvøldið avgreiddi FSF málið**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Tað elvdi til ikki sørt av ónøgd í NSÍ, at nýggi áleyparin Karsten From ikki slapp at spæla við ímóti GÍ sunnudagin, sum NSÍ annars vann 1-0.

NSÍ sendi Fótbóltssambandinum pappírini fríggjadagin eftir middag, men FSF hevði ikki avgreitt málið áðrenn dystin sunnudagin, og tað vóru runavíkingar sera ónøgdir um.

Mánakvøldið varð málið tó avgreitt, og Karsten From kann spæla við í komandi landskappingardysti hjá NSÍ, sum verður ímóti VB í Vági tann 24. august.

### Eingir trupulleikar

Hetta kvøldið hevði sáttmálanevndin hjá FSF fund um málið, og hon góðkendi skiftið hjá Karsten From úr Havn til Runavíkar. Hetta upplýsir Dánjal Andreasen, formaður í FSF.

Dánjal Andreasen sigur, at Karsten From og HB undirskrivaðu sáttmála áðrenn dystin millum HB og NSÍ tann 3. august. Síðani varð hann loystur aftur frá sáttmálanum fyri at gera nýggjan sáttmála við NSÍ.

Við at undirskriva ein sáttmála gjørdist Karsten From yrkisleikari ístaðinfyri áhugaleikari, og tá er ikki neyðugt at bíða í ein mánað, áðrenn eitt felagsskifti kann gerast veruleiki, sum tað annars er hjá áhugaleikarum.

Evstamark hjá áhugaleikarum at skifta felag er 31. juli, men hjá yrkisleikarum er markið 10. august, og tí kundi Karsten From skifta felag eftir at hava undirskrivað ein sáttmála.

Runavíkingar óttaðust kanska fyri, at Karsten From varð noyddur at sita yvir í ein mánað, um FSF ikki góðkendi skiftið, men ongar forðingar vóru fyri hesum.

### Skilir ikki ónøgd

Dánjal Andreasen sigur seg als ikki skilja ta ónøgd, sum ítróttarstjórin í NSÍ, Ian Højgaard, gevur til kennar í Dimmalætting.

– Eg skilji ikki ónøgdina hjá teimum. Teir kunnu ikki vænta, at vit kunnu avgreiða eitt mál, sum vit fáa í hendi fríggjadagin seinnapart, so at ein leikari kann spæla við sunnudag, sigur formaðurin í FSF.

Dánjal Andreasen sigur, at løgfrøðingurin hjá FSF, sum er Christian Andreasen var uttanlands, og hann var ikki aftur í Føroyum fyrr enn leygarkvøldið, og tí kundi málið ikki avgreiðast beinanvegin.

Dánjal Andreasen sigur, at júst henda støðan millum HB, Karsten From og NSÍ var nýggj fyri FSF og fór at skapa fordømi fyri onnur líknandi mál. Tí var ikki møguligt at avgreiða tað uppá standandi fót.



*Hann fann ikki serliga væl útav tí við HB, men nú kann Karsten From endiliga gera seg til reiðar at spæla fyri nýggja felag sítt, NSÍ. Mánakvøldið kom alt uppá pláss viðvíkjandi skiftinum úr HB til NSÍ*

# Todi og Zuma á toppinum

**FCK, sum eftir øllum at døma fer at spæla uttan vanliga liðformannin, fer at lúra eftir møguleikanum fyri snarálopum í Glasgow í kvøld**

EUROPA CUP
*Jóannes Hansen*

Í kvøld fara Todi Jónsson og liðfelagarnir í FCK undir týdningarmiklasta stríðið, sum felagið hjá teimum hevur verið í nakrantíð. Setningurin er at røkka bólkaspælinum í europeisku kappingini fyri meistaralið. Eingin føroyingur hevur nakrantíð áður verið við í tí kappingini. Um tað skal eydnast Toda og teimum at røkka so langt, so skulu teir vinna samanlagt í kvøld á Ibrox í Glasgow og um fjúrtan dagar, tá ið Rangers fer at vitja í Parkini í Keypmannahavn.

FCK ferðalagið fór til Glasgow fyrrapartin í gjár. Teir eru tjúgu spælarar í ferðalagnum. Millum teirra er óvæntað brasilski álopsspælarin Álvaro Santos, men tað verður ikki roknað við, at hann verður á vøllinum. Í hvussu so er ikki millum teir fyrstu ellivu. FCK venjarin, Hans Backe, sigur, at brasilski spælarin er fyrst og fremst við í Glasgow fyri at fáa viðgerð fyri skaðan, sum hevur hildið honum burtur frá fótbólti í nakrar vikur. Men samstundis leggur eitt sindur hulni venjarin afturat, at tað er ikki heilt útilokað, at nýggi spælarin verður settur á vøllin, um tað verður mett at verða neyðugt.

Danskir fjølmiðlar siga, at alt bendir á, at Todi Jónsson verður millum teir fyrstu ellivu. Hann og Zuma fara at manna álopið, og teir báðir eru fullvæl greiðir yvir, hvat tað snýr seg um.

– Hetta verður, sum tað plagar at vera í Parkini. Heimaliðið fer at kroysta okkum. Vit mugu ansa eftir ikki at gera mistøk í verjuni, og so mugu vit vóna, at vit fáa nyttu burturúr møguleikunum, sum vit heilt víst fara at fáa fyri at fara í snarálop, sigur Zuma, sum heldur, at myndingin av spælinum fer heilt víst at passa væl til FCK álopsspælararnar, sum ivaleyst fáa møguleikar at vísa, hvussu ferðmiklir teir eru, og hvussu væl teir duga við bóltinum.

Liðformaðurin hjá FCK, miðvallarveteranurin Peter Nielsen, er so mikið skaddur í rygginum og lærinum, at tað er lítið sannlíkt, at hann verður førur fyri at spæla. Tí verður roknað við, at Thomas Røll fer at spæla undir liðini á Erik Mykland á sentrala miðvøllinum, og at Morten Bisgaard, sum hevur verið leingi skaddur, fer at spæla í vinstrua borði.

Erik Mykland heldur ongan iva vera um, at Glasgow Rangers er favorittur, og at teir í FCK skulu spæla upp til sítt besta og samstundis vera hepnir, um tað skal eydnast hjá teimum at røkka einum úrsliti, sum kann verða gott grundarlag undir returdystinum um tvær vikur.

– Tað hevði sjálvandi verið framúr og sera týdningarmikið, um tað hevur eydnast hjá okkum at skora eitt mál, sigur Zuma.

Uppgerðin verður at síggja á TV Danmark 1 rásini í kvøld.



*Zuma og Todi vera allarhelst menninir, sum fara at manna álopið hjá FCK ímóti Glasgow Rangers í kvøld*



# Summar rokkur í Hjørring

**Árliga Open by Night tiltakið í Hjørring var nakað serligt í ár tí okkara kendi sanglerkur Guðrun Sólja vitjaði við síni undurføgru rødd**

*Orð og myndir:*
*Ólavur í Beiti*

Eg hevði ætlanir um at fáa eitt stutt prát við Guðrun Sólju eftir at hon hevði verið á palli, men tað var ógjørligt. Aftan fyri stóra pallin vóru gyrðingar og við endan av eini gongd stóð ein vøruvognur, sum tipti fyri so eingin slapp inn aftanfyri.

Fleiri royndu at rópa inn um gyrðingina, men neyvan hjálpti. Og tað vóru mong, sum vildu hava eina undirskrift frá Guðrun Sólju, men eg veit ikki, um tað eydnaðist teimum seinni.

Open by Night í Hjørring fríggjadagin tann 8. august var nakað serligt fyri okkum føroyingar her í Vendsyssel, tí Guðrun Sólja skuldi syngja, men eg veit eg ikki, hvussu víða tey hava verið við hesum tiltaki.

Onnur nøvn í Hjørring í ár vóru vælkendi Peter Belli, Keld og Hilda Heick, Niemeyer, Søs Fenger og Guðrun Sólja.

Men sjálvt tiltakið Open by Night umfataði mangt annað, eitt nú fleiri kappingar av ymiskum slagi, og so høvdu allir handlarnir í miðbýnum sera góð tilboð. Veðri siga vit einki um á hesum sinni, tí júst sum eg skrivi hesar reglur eru vit miðskeiðis í eini hitabylgju her í Danmark.



*Millum kendu nøvnini á pallinum í Hjørring á árliga Open by Night tiltakinum var Peter Belli*

skilti, at føroyingar vóru eisini komnir aðrastaðni frá at hoyra hana.

Og ikki bara føroyingum dáma Guðrun Sólju, tað skiltist á øllum brøgdum, tá hon kom á pallin og fór at syngja teir vælkendu sangirnar frá kappingini Stjerne for en aften, sum hon vann. Guðrun Sólja sang eisini aðrar sangir, eitt nú Imagine hjá John Lennon, og eg má siga at hesin sangur fekk líkasum nýggjan íblástur og nýggjan búna, tá Guðrun Sólja framførdi hann við síni yndisligu og stóru rødd.

Keld Heick, sum bæði sang og var konfrencier, málbar seg soleiðis, at Guðrun Sólja (danir nevna hana bara Guðrun) hevði líka stórbæra rødd sum tann vakra og stórbæra føroyska náttúran, og spurdi so yvir alla mannamúgvuna: Har I været der?

### Se&Hør

Tað er Se&Hør, sum stendur fyri Summar Rokkinum í ár, og av tí at eg ikki fekk orð á Guðrun Sólju



*Guðrun Sólja Jacobsen bergtók eisini norðurjydarnar, eins og hon hevur bergtikið fólk alla aðra staðni í ríkinum*



*Katrin var ein av føroyingunum, sum hevði leitað sær til konsert við Guðrun Sólju, nú hon vitjaði í Hjørring*

# Stór orð hoyrast betur

**- Fiskimálaráðið hevur greitt brotið lógina um vinnuligan fiskiskap, og har er finst einki annað orð fyri tað enn ólógligt, sigur Heini O. Heinesen, formaður í landsstýrismálanevndini í viðmerking til at ein av arkitektunum handan stýrisskipanarlógina fanst at løgfrøðiliga málburðinum í niðurstøðuni hjá nevndini um Jógvan S.**

ORÐALAG
*Rúnar Reistrup*

Landsstýrismálanevndin er ein politisk nevnd og átti ikki blandað jura og politikk saman, segði ein av arkitektunum handan stýrisskipanarlógina, Annfinn V. Hansen, løgfrøðingur, við Sosialin í gjár, og vísti millum annað til, at tað er óheppið at ein politisk eftirlitsnevnd sum landsstýrismálanevndin brúkar eitt løgfrøðiliga so sterkt orð sum »ólógligt« í niðurstøðu síni um Jógvan S málið, eftir bert at hava viðgjørt tað politiskt.

Men orðið ólógligt tænir einari søk í niðurstøðuni, sigur formaðurin í landsstýrismálanevndini, Heini O. Heinesen. Nevniliga at fáa tingmenn at skilja, at nakað álvarsamt er á vási.

- Um man ger spakar viðmerkingar, so er tað ikki ein tingmaður, sum lurtar. So tá nakað er ólógligt, er betur at siga tað sum tað er, heldur enn at kalla tað okkurt annað, sigur Heini O. Heinesen, formaður í landsstýrismálanevndini. Hann vil vera við, at tær ymsu kanningarstjórafrágreiðingarnar, sum hava verið lagdar fyri tingið millum ár og dag, hava verið orðaðar nakað veikt og tað hevur onkuntíð elvt til at tingmenn ikki rættiliga hava skilt álvarsemið í ákærunum.

- Fiskimálaráðið hevur greitt brotið lógina um vinnuligan fiskiskap, og har er finst einki annað orð fyri tað enn ólógligt, sigur Heini O. Heinesen, sum ikki ætlar at brúka smærri orð í framtíðar niðurstøðum hjá landsstýrismálanevndini.

## Nýggj Býarskipanarnevnd

BÝARSKIPAN

Landstýrismaðurin í umhvørvismálum hevur í dag valt nýggja Býarskipanarnevnd.

Uppgávan hjá Býarskipanarnevndini er sambært løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir at ummæla býarskipanir og byggisamtyktir hjá kommunum og broytingar í hesum. Somuleiðis virkar nevndin sum ráðgevandi nevnd hjá Oljumálaráðnum í øðrum býarskipanar- og byggimálum.

Limir í nevndini næstu fýra árini verða:

Ole Jensen, Landsverkfrøðingurin
Øssur Á. Midjord, Matrikulstovan
- Jóhannes Dalsgarð, Føroya Jarðarráð
- Erika Lómstein Petersen, Føroya kommunufelag
- Heini Holm, Føroya kommunufelag
- Trygvi F. Guttesen, Tórshavnar kommuna
- Gurið Joensen, stjóri á Kærustovni Føroya

Nýggjur formaður í Býarskipanarnevndini verður Gurið Joensen, meðan Petur Nielsen heldur fram sum skrivari.